gult14 cyan14 magenta14 svart14



## Fimm mistu koyrikortið

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Løgreglan hevur verið nógv úti um vikuskiftið, og tað úrslitaði í, at fimm førarar mistu koyrikortið. Fýra fyri at koyra við kenning, meðan ein varð tikin fyri at koyra ov skjótt.

Vikuskiftið hevur verið langt, og tí hava umstøðurnar at fáa sær eina kenning verið betri enn vant. Leygardagin var løgreglan úti og gjørdi vanligar kanningar, og tríggir førarar vórðu tiknir fyri at hava ov nógv alkohol í blóðinum. Sunnudagin var enn ein tikin fyri at koyra við kenning.

Blóðroyndir eru tiknar av teimum øllum, og tær eru sendar niður. Er promillan millum 0,5 og 0,8 fáa førararnir eina treytaða frádøming av koyrikortinum, men er promillan hægri enn tað, so er frádømingin treytaleys.

Leygardagin var løgreglan eisini úti við ferðmátaranum í sambandi við landsdystin á Svangaskarði. Har var ein tikin fyri at koyra upp ímóti 120 kilometrar um tíman.

Annars hava nøkur smá ferðsluóhapp verið, tó uttan stórvegis skaða.

## Umfatandi ferðmátingar í Søldarfirði

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Nógv ferðsla hevur verið á Skálafjørðinum hetta vikuskiftið. Bæði í sambandi við vitjanina av trúboðanarskipinum Logos II og landsdystin millum Føroyar og Sveis.

Fríggjadagin var løgreglan úti við ferðmátaranum í Søldarfirði. Ferðin varð tikin nakað inni í bygdini, so at bilarnir skuldu hava ríkiligt av tíð til at taka ferðina av bilinum.

Ferðin á fleiri enn hálvthundrað bilum varð mátað, men bara tríggjar frágreiðingar vórðu skrivaðar, og eingin misti koyrikortið.

Úr Klaksvík verður sagt frá einum friðarligum vikuskifti, har tey nú fyrireika seg til Norðoyarstevnuna.

## Eldur í næmingaheimi

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Sunnumorgunin um klokkan níggju ringdu fólk av næmingaheiminum Undir Fjalli og boðaðu frá, at eldur var komin í eina sofu.

Onkur av teimum hevði mist eina sigarett á sofuna, sum fór at loga. Beinanvegin fekst tamarhald á eldinum, og eingin fekk álvarsamt mein. Nakað av roykskaða stóðst av eldinum, men annars vóru skaðarnir avmarkaðir.

## Nakað av herverki

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Barnagarðurin á Lítlaskógi hevur stórar trupulleikar av smádreingjum, ið renna á takinum á barnagarðinum, tí takpláturnar eru ikki so sterkar, at tær halda til, at fólk rennur á tí. Um vikuskiftið eru fleiri plátur aftur brotnaðar.

Løgreglan hevur tí fingið fráboðan um, at hetta er ein stórur trupulleiki. Skaðarnir gerast stórir, sum frálíður.

Harumframt hevur nakað av herverki verið. Onkur skúli hevur staðið fyri skotum, og okkurt handilsvindeygað er eisini brotið.

Bara tvey fólk hava verið á støðini og sovið rúsin av. Hetta er ikki nógv, tá hugsað verður um, at løgreglustøðin síðan ársskiftið í miðal hevur havt ein persón um samdøgrið inni á støðini at sova rúsin av sær.

Annars verður sagt av løgreglustøðini, at tey hava verið nógv úti um vikuskiftið, og tað hevur kanska verið fyribyrgjandi.

# Mintust serlingin úr Kvívík



*Eini fimm hundrað fólk vóru komin saman at minnast Jóan Petur uppi í Trøð*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Annan Hvítusunnudag var stórt minningarhald um kvívíkingin Jóan Petur uppi í Trøð. Eini fimm hundrað fólk vórðu komin saman at minnast Jóan Petur, ið varð mettur at vera ein serlingur, tá hann livdi**

MINNINGARHALD
*Stefan í Skorini*

– Spurningurin er, um hann er eitt minningarhald verdur, og alt bendir á, at so er, sigur J.P. Gregoriussen, arkitektur, sum hevur verið við til at skipa fyri hátíðarhaldinum.

– Tað er líkt til, at kvæðini og skaldskapurin annars, ið hann legði frá sær, verða kvøðin enn og framvegis liva á fólkamunni.

Brúðarvísan, Waagen, Tróndarkvæðið og Gentukæti verða nógv kvøðin, og tey eru øll av hond Jóan Peturs.

At hansara kvæði enn liva á mannamunni er ein greið ábending um, at Jóan Petur uppi í Trøð enn hevur ein boðskap at bera okkum, og tí er minningarhaldið uppá sítt pláss.

### Eydnaðist væl

Annars eydnaðist tiltakið væl. Har vóru fleiri enn fimm hundrað fólk møtt upp, og so nógvum høvdu fyrireikararnir ikki roknað við. Millum áhoyrararnar vóru bæði bygdafólk og ættarfólk hjá Jóan Peturi.

Umframt at hava latið nógv skrivligt tilfar úr hondum, tók Jóan Petur nógvar myndir, og tær vórðu sýndar fram undir minningarhaldinum. Stórt siðsøguligt virði er í hesum myndum.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður, og Eyðun Andreassen, fólkalívfrøðingur, hildu talu við minnisvarðan, sum er reistur yvir Jóan Petur í Kvívík.

– Vit eiga at hjúkla um okkara originalar, segði Høgni Hoydal í sínari røðu, og Jóan Petur var mettur sum serlingur millum síni bygdafólk, tá hann livdi. Tað, sum Jóan Petur tókst við, var ikki serliga nógv virt millum manna.

Skaldið var íðin tjóðskaparmaður, men hann andaðist í 1901, áðrenn tað partapolitiska stríðið av álvara kyknaði í Føroyum.

– Hann var ógvuliga virkin í stríðnum fyri at varðveita tað føroyska málið, og tað var eitt av hansara aðalmálum, sigur J.P. Gregoriussen.

– Hann hevur framvegis ein boðskap at bera okkum, sigur J.P. Gregoriussen.



*Grækaris A. Joensen og J. P. Gregoriussen skipaðu fyri minningarhaldinum, meðan Eyðun Andreassen (vm) helt røðu*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Nakrir eldri kvívíkingar lýða á*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

gult15 cyan15 magenta15 svart15

ítróttur

Nr. 105 • mikudagur • 6. juni 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# StÍF missir málverjan

**Landsliðsmálverjin í hondbólti, Johan Danielsen, fer komandi kappingarár at verja málið hjá Kyndli**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað líkist einari hampuliga stórari málverjarokadu í føroyskum manshondbólti til komandi kappingarár. Í øllum førum tykist greitt, at fýra av teimum bestu málverjunum í kappingini ikki fara at spæla við somu feløgum í heyst, sum teir gjørdu við kappingarlok í fjør.

Vit hava áður nevnt, at tað í øllum førum var sannlíkt, at Kyndil skuldi hava nýggjan málvera, tí Jens av Skipagøtu í øllum førum ikki spælir alt komandi kappingarárið. Kyndil hevði í fjør eisini Petur Magnusson í málinum seinasta partin av kappingini, men hesin verður nú aftur at síggja í Neistanum, sum hevur mist danan, Lars Winther.

### Johan til Kyndil

Fyri at byrgja upp fyri hesum hevur Kyndil verið á Strondum eftir málverja, og komandi ár fer so Johan Danielsen at spæla við teimum grønu úr Havn.

Við Sosialin sigur Johan, at felagsskiftið mest av øllum er íkomið, tí hann hevur hug at royna onkrar nýggjar avbjóðingar.

- Tað haldi eg er fremsta orsøkin til, at eg skifti felag til komandi ár. At tað so júst er Kyndil, kemst í stóran mun av, at Jónleif Sólsker verður venjari hjá teimum komandi ár. Mær dámdi væl at arbeiða undir honum á Skála, og eg gleði meg til nýggju avbjóðingina í Kyndli.

Tað hevur ljóðað, at StÍF skal fáa ein rumenskan málverja til komandi kappingarár, men Johan avvísur, at hetta hevur nakað við skiftið at gera.

– Nei, avgjørt ikki. Tvørtur ímóti kundi tað verið spennandi at fingið ein somikið sterkan kappingarneyta í málinum, men avgerðin hjá mær hevur so einki við tað at gera. Lat meg eisini leggja afturat, at eg eri glaður um tað forstáilsi, sum eg havi møtt, tá eg havi greitt fólki frá hesum. Eg havi jú altíð spælt hondbólt við StÍF, og eg skal helst eisini kunna tosa við fólk á Skála og Strondum aftur, sigur Johan at enda.

Kyndilsvenjarin, Jónleif Sólsker, er sjálvandi eisini fegin um, at tað hevur eydnast at fingið Johan at verja málið komandi kappingarár.

- Johan er so avgjørt ein góður fongur at fáa hjá einum og hvørjum liði. Tað er ikki víst, hvussu verður við Jens, men í øllum førum hevði hann ikki verið her alt kappingarárið, og tí kann eg bara vera nøgdur um, at hesin trupulleikin nú er loystur.

### Eingin rumeni er komin

Sum nevnt omanfyri, so hevur tosið gingið um, at StÍF komandi ár skal hava ein rumenskan málverja, sum leikandi venjarin, Costin Dumitrescu, hevur fingið fatur á. Av Skála verður tó sagt, at einki enn er avgjørt hesum viðvíkjandi.

- Tað er rætt, at tað hevur verið tosað aftur og fram um hatta, men enn er so einki ítøkjuligt hent við hesum, sigur Andrass Danielsen av Strondum. Hann vísur á, at hetta veldst um so nógv, og at endalig støða enn ikki er tikin til spurningin.



*Johan Danielsen, sum í fleiri ár hevur verið skansin hjá StÍF fer komandi árið at spæla við Kyndli*



*Lars Winter verður ikki við Neistanum komandi ár*



*Ivasamt er við Jens av Skipagøtu, men hann verður heilt víst ikki í Føroyum alt kappingarárið*



*Petur Magnusson var við Kyndli seinastu dystirnar í vár, men hann verður nú aftur at síggja í Neistanum*